# Navnið spillir ongan, men tað útihýsir og skerjir onkran - Tórsbreyt eitt óheppið navn?

RANDI KÚRBERG



Herfyri fingu nýggju leikvøllirnir norðan fyri Ringvegin í Havn, heitið Tórsbreyt. Navnið er samansett av tveimum orðum: 'Tórs' og 'breyt'. Fyrri orðliður møguliga fyri at gera tað serliga havnarligt, alt meðan heilhjartað havnarligt útiletur fyrra orðlið í 'Tórs-havn'.

Tað er kanska ein roynd at fríggja yvir um vegin, har alt, ið bara hevði nakað sum helst við breyt at gera fyri nøkrum árum síðan, var ónevniligt. Jú, - við politikki og myndugleikanýtslu kann nógv blak vera borið fólki fyri eyguni.

Ella kanska er tað eitt tema, ið Havnar kommuna er farin í holt við? Lovaða fimleikahøllin norðan fyri Tórsvøll skal kanska eita 'Tórshøll', og 'Tórskjallari' verður niðast í eystara enda millum hornafløgg og sláimaskinur. Um hon ikki kemur, tað er tað sumt, ið bendir á, so kann hon fyri tað fyrsta brúkast sum vallyfti eina ferð enn, og navnið 'Tórshøll' skal so heldur brúkast til høllina á Hálsi, sum viðhvørt eitur 'høllin á Nabb,' millum børn eitur hon 'grøna høll', men almenna navnið er Tórshavnar Ítróttar- og Samkomuhøll. Tað er óivað hóskandi, tí seinastu árini er tað ikki tað gildið við virðing fyri sær sjálvum, sum ikki hevur staðið í høllini á Hálsi, og soleiðis kann ein alment sameina ítrótt og drykkjumentan.

**Breyt við plássi fyri øllum, men ikki fyri vøllum**

Síðan er tað seinni orðliður 'breyt', ið merkir vegur ella steinsett geil til neyt, sum Føroysk Orðabók (1998) hevur sum aðru merking. "Eg búgvi á Tórsbreyt 4" – "Ja, og omma mín býr á Heygsbreyt 18." Vit kenna orðið frá gøtunøvnum, t.d. Løgmannabreyt og Sandáarbreyt, og so fólkaskúlanum, har framhaldsnæmingar velja sær ávíst evni at arbeiða nærri við, - teir hava avmarkað seg at fara neyvari til verka innan valt øki. Júst eina avmarking, okkurt snævurt, eins og ein avrættaður vegur, hvørt tað veri geil ella jarnbreyt, haldi eg orðið 'breyt' vera. Navnið er úrvalskent og sostatt í andsøgn bæði við tað margfeldni, sum frælsu ítróttirnar umboða, og samhaldsfesti, sum øll ítrótt sigur seg hava sum vørumerki. Tað er ivaleyst komið við íblástri frá orðinum 'rennibreyt', men 'rennibreyt' er ikki alt – verri enn so. Har eru so ótrúliga nógvir aðrir leikvøllir til alskyns kappingargreinar! Summar greinar hava breyt loðandi uppi við sær, t.d. fløtu lopini, annað av teimum høgu og spjótkast, men tað mest áhugaverda við trístøkki og longdarlopi er pettið millum bjálkan og lendingina í gryvjuni, í spjótkasti frá marki til lendingarmerki og í stangarlopi er tað pettið frá jørðini til yvirliggjaran. Restin at greinunum hava einki við breyt at gera, men allar hava við leikvøll at gera. "Tungu" kastararnir fara í ringin – aldrin á nakra breyt! Hvat er galið við 'leikvølli' ella bara 'vølli'? 'Leikur' snýr seg um spæl, rørslu og kapping, og 'vøllur' um nakað grønt, grasvaksið uttan serliga nógv grót. Um tað ikki kann setast í samband við leikvøllirnar norðan fyri Ringvegin, so fati eg ikki ein metur av tí heila. Tað kann eita 'sparkivøllur'. Er orðið 'vøllur' av málmyndugleikum kannað fótbólti og ongari aðrari uttanduraítrótt? So er orðið elitert. Um tað bara hevur við rennibreyt at gera, so er tað eisini úrvalskent. Á enskum eitur tað track & field, á føroyskum svarar heitið til track. Ella kanska traðk? Hvar er field í hesi navnagávuni? Hevði tað av øllum illum verið eitt fleirtalsorð sum eitt lítið tekin um virðing fyri fjølbroytni, men nei. Bretar siga 'athletics' og íslendingar brúka fleirtal um sama orð, nevniliga 'frjálsar íþróttir'.

Eg skal ikki siga, at Tórsbreyt er kiksað heiti, men óheppið er tað, og 'leikvøllir' man vera tað frægasta at brúka, tí tað í besta og sunnasta ítróttaranda fevnir um allar frælsu ítróttirnar uttan at virðismeta eina hægri enn aðra.

Við havnarheilsan!

# Tá ið orkupolitikkur er náttúruneyðtøka

JACOBA FUNDING

Eg hevði ætlanir um, at hetta lesarabrævið skuldi vera blaðnum í hendi fyri døgum síðani, men av tíðartroti kemur tað so nústani.

Eg taki so dyggiliga undir við íbúgvunum við Streymin, sum herfyri tóku stig til at samla undirskriftir í móti Eiði 2 verkætlanini, ið SEV nú er í gongd við at fremja, og sum ber í sær, at Stórá har norðuri verður turrløgd.

Og til fólkið við Norðskála vil eg siga: "Tað er gott, at tað glógvar í onkrum".

Hendan vatnorku-útbyggingin, sum kommunurnar og friðingarnevndin í Eysturoy so óskiljandi hava givið loyvið til, er ein so óbótalig neyðtøka av náttúruni, at tað finst ikki orð fyri tí.

Og eitt vita vit. Er sárið fyrst lagt opið, aftur grøðist ikki.

Vit hava jú sjón fyri søgn í tí fyrru útbyggingini av Eiði 3, ið varð framd frá 1997 og fram til 2000. Tá vórðu tær flestu norðastu áirnar suður til Vesturdalsá millum Fjarða tiknar.

Hettar førdi millum annað við sær, at í dag rennur millum lítið og einki vatn í tí fyrr so tignarligu og vøkru Stórá, sum býtir heimbygd mína Funning sundur í tvíningar.

Sjálvt um eg nú búgvi í høvuðsstaðnum, so vitji eg norður í heimbygdina, og eg vil siga, at tað verður bara sjónskari og sjónskari fyri hvørja ferð eg komi norður at síggja, hvørjum missi bygdin hevur verið fyri.

Meg minnist sum barn, hvussu nógvar tímar vit brúktu í Stórá, har vit vassaðu í tí grøna og tjúkka mosanum. Og ikki at forgloyma tey stóru sílini, sum smugu sær millum steinarnar.Vit byrgdu svimjihyl og fiskaðu síl. Ja, áin var okkara spælipláss, okkara paradís.

Vøkru summardagarnar liggur nú áin brún, upptornað og steindeyð.

Børnini, sum koma norður at ferðast, standa mitt á hesum brúnu berunum í løriftsskóm og hyggja niður fyri seg.

Stóru ferðafólkabussarnir fara strúkandi framvið Funningi til Gjáar. Enn hava tey har ta vøkru ánna, men hvussu leingi?

Nú um dagarnar er eisini so hugaligt at hoyra arkitektin Albert Isfeldt í útvarpinum meta um hvørjar dygdir bygdirnar í Føroyum hava reint arkitektoniskt. Ein ógvuliga áhugaverd sending, sum gevur "stof til eftertanke".

Eitt er, hvussu tú handaliga kanst fríðka um heimbygdina hjá tær, og gera hana ásýniliga fyri gestsins eyga, hitt má so vera, hvussu tú dugir at síggja og verja um tey virðini, sum heimbygdin hevur frá Harrans hond.

Hvør tosaði um at lívga um tær smáu bygdirnar og gera tað vakurt og liviligt í teimum?

Eg vil enda hesi orð míni við at taka uppaftur tað, sum stigtakararnir við Streymin so inniliga siga tað. "Vælsignaðir vísið høgv!" Ikki bara SEV, men so sanniliga eisini kommunurnar í hvørjari bygd ,og yvirfriðingarnevndirnar. Tað eru jú tit, sum hava síðsta orðið, ella hvussu?

Orku hava vit fyri neyðini, men hon má kunna fáast upp á onkran annan máta enn at skemma okkara vøkru náttúru so meint.

# Fullveldisflokkarnir liggja sum teir hava reitt - prísin gjalda Føroya fólk

JOHAN DAHL



Uttan himpr sminkaðu loysingarflokkarnir blokkin við 365 milliónum um árið frá 2002, umframt framhaldandi prístalsviðger av eftirverandi blokkstuðuli, sum m. a. er til sjúkrahúsverk, fólkapensjón og sosialar tænastur.

2,4 milliardir færri krónur at brúka til vælferðarænastur og partsgjald av hesum.

Prístalsviðgerðin svarar til um arðar 50 mill um árið, sum eisini eru burtur.

Mín áheitan er at seta pristalsviðgerina av blokkinum at virka aftur, tá fariå verður aftur til samráðingar um blokkin.

Lyftini halda ikki:

Tær lovaðu nýggju vinnurnar og inntøkurnar – hvar blivu tær av?

Tann stóri skapanarhugurin – er hann blivin størri uttan blokkin?

Er Føroyar blivið eitt betri land at livað í?? - Spyr pensjónistin, sjúklingin, sjómanini og skúlanæmingin

Er okkara fiskiflotin voráin meira inntøkugevandi ella okkara fiskivinna sum heild

Hava vit fingið betur marknaðaratgongd til okkara útflutningsvinnu?

Tey kreativu evnini, sum blokkurin eisini skapti mentala blokering fyri, eru tey blivin ment??

Svarast kann neyvan játtandi til nakran av hesum spurningum.

Alt meðan vinnan og samfelagið stendur framman fyri ovurstórum avbjóðingum, tosa hesir somu menn við hjálp frá Javnaðarflokkinum, Gud hjálpi mær, um enn fleiri yvirtøkur um skerjan av enn meira blokki komandi árini.

Ørkymlandi má tað verða hjá øllum sum standa á síðulinjuni og skoða hetta Sirkus Tinganes, sum leikar í løtuni - og hetta show er ikki gratis, um onkur heldur tað, prísin koma vit øll at gjalda seinni í ár, tá avgjalds- og skattahækkingarnar fara at koma.

Blokkurin er ikki og hevur ongantíð verið trupulleikin fyri føroyska samfelagið – tvørturímóti – tað er loysingarvongurin í føroyskum politikki, sum er trupuleikin.

Teir hava ongar loysnir og enn minni visjónir um, hvussu framtíðar vælferðarsamfelagið Føroyar skal skipast, tíverri.

# Tveir spurningar til Gerhard Lognberg

KAI VÁGFJALL

kv@post.olivant.fo

**1.** Hava sandoyingar ikki brúk fyri skúladeplinum í Marknagili?

**2.** Hava sandoyingar ikki brúk fyri útlendskari arbeiðsmegi?

Annars tekur undirritaði undir við, at vit fáa ein tunnil til Sandoynna.